Summar FRÁSØGN

EFTIR ÓLAV AV HEYGUM | LAGT TIL RÆTTIS: DAGFINN OLSEN

# HEIÐUR OG Í SVØRÍKI




TÁ **10-MANNAFARIÐ** TVØRÁBÁTURIN KOM TIL "**ÆRE OG VÆRDIGHED**" Á MARINEMUSEET Í **KARLSKRONA** HJÁ SVIUM

Til tiltakið "VETERANBÅTDAGEN", var felagið Tvørabáturin í Keypmannahavn boðið til luttøku á ta árligu framsýning, sum Marinemuseet i Karlskrona fyrireikar. Ólavur á Heygum hevði fingið samband vid leiðaran Manne Dunge, somuleiðis sum hann var ferðaleiðari fyri 20 fólkun, sum fóru avstað vid báti á trailara og 3 bilum.

Fríggjadagin tann 2. juli kl. 14.30 var farið frá Nordhavnini í Keypmannahavn. Hitin var um 28 stig, og heitt var at koyra. Vit koyrdu so 270 km til Blekinge skergarðin. Høvdu pausu á einum "rasteplássi", og fingu okkum kaffi og okkurt kølievni. Dánial á Skarv var so umhugsin , at hann hevði ein stóran posa av ísi, og tað køldi væl um tað danska bjórið.

Vit vóru so heppin, at kunna leiða eitt bóndahús mitt í skógini, sum tilhaldsstad. Húsið eigur ein dansk/svenskari, og eitur tað "Farmors Hus". Har komu vit á kvøldi um kl. 19 00. Vín Pauli og konan høvdu stokt eina góda lambasteik framanundan, sum bleiv bleiv hitað upp. Og tá so Martin Fjallstein hevdi gjørt fína salat, og Pauli gav henni okkurt navn á fronskun, sum eg ongantíð havi hoyrt fyrr, og bleiv tað ein sera vælumtókt máltið. Hýrurin bleiv so góður, at onkur sat og hekk við borðið til kl. 05 00 um morgunin. Tað bleiv sungið og fortaldar skrønir og onkur sang um Petur Háberg eftir H. Andreas Djurhuus. Soleiðis fekk hettar kvøldið næstan "Ólavsvøkudám".

Ólavur og Aase riggaðu kl. 10 00 tað tey kalla "Brunch" til við øllum góðum viðskera. Har ímillum hevdi Dánial gjørt skinssíðu. Á middegi leydardagin kom so ein bólkur við 8 monnum og kvinnum afturat. Tað var sum í einum bóndahúsi í Føroyum í gomlum døgum. Har bleiv etið og prátað til eina ferð, at vit skuldu rigga Tvørábátin til framsýning á Marinemuseum í Karlskrona.

Báturin bleiv stillaður upp beint frammanfyri Marinemuseet. Martin Fjallstein hevdi gjørt skiltir og sett í bátin við einum stativi. Hettar var so vælgjørt, at fleiri fólk komu og spurdu dúgliga um tann føroyska bátin. Snotiligur sá báturin út við føroyskun flaggi á stong í miðjuni og flaggi aftur í rong. Báturin stóð allan leygardagin og til sunnudagin, tá tad skuldi gerast ein framsýningarróður.

Allir luttakararnir, 20 í tali, fingu fríðan mat á plássinum, bæði leydardag og sunnudag, frá fyrireikarinum, Karlskrona Marinemuseum.

Sunnudagin bleiv róð framsýningarróður við Tvørábátinum. Har bleiv gjørd frásøgn við hátalarum. Og tað var ikki eiti á, sum sviarnir tóku til. "Nu kann vi se, hvordan en båt skal ros rigtig i dette lilla Vikingeskib fra Færøyane".

At enda vóru frambornar heilsur við gávum og steypum. Eg fekk høvi at siga nøkur orð, og handaði eg teimum eina føroyska grótmynd, og eina T-shirt við logo av Tvørábátinum. Eg greiddi eitt sindur frá bátinum og okkum sum ein partur av nordurlanda tjódunum, sum tann 6. svanurin , sum ofta verður gloymdur, men var nú komin til Karlskrona og samanbar okkum eina "nynorska" yrking.

:: dej vil altid klaka og kyta, at meg ganga so seint og smátt, men eg tenker, det tarv ikki syta, at meg koma um ikki so brátt ::

Soleiðis endaði henda frásøgn.

***Við róðrarkvøðu***
**Ólavur á Heygum,**
**tann 20. juli 2010.**